Djóni Nolsøe Joensen **Nr. 28/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um útbúgving í journalistikki, settur landsstýrismanninum í mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at seta á stovn útbúgving í journalistikki?
2. Um so er, nær ætlar landsstýrismaðurin at seta hesa á stovn?
3. Hvussu heldur landsstýrismaðurin, at ein slík útbúgving eigur at verða skipað?

Viðmerkingar:

Hvat skulu føroyskir miðlar vera? Hvønn miðlaheim skulu vit hava á føroyskum máli? Og hvønn leiklut ynskja vit, at miðlarnir hava í føroyska samfelagnum? Hetta vóru nakrir av spurningunum, sum ein arbeiðsbólkur undir Mentamálaráðnum svaraði í álitinum Betri miðlar (2011). Arbeiðsbólkurin vísti á, at tað hevði týdning fyri føroysku miðlamentanina, at Fróðskaparsetrið fór at bjóða út útbúgving í miðlafrøði í 2012.

Arbeiðsbólkurin vísti á, at verður eitt slíkt útbúgvingartilboð á Fróðskaparsetrinum, fer tað at hava við sær, at tað í framtíðini verður granskað meira í føroyskum miðlaspurningum. Eisini varð væntað, at tað fer at elva til, at størri partur av starvsfólkunum í miðlunum hava útbúgving.

Haraftrat varð mett, at tað kann styrkja serlig vitanarøki hjá tíðindafólkunum, so summi tíðindafólk fáa serligar førleikar at viðgera og miðla ávís viðurskifti. Lesandi kunnu seta saman fak á ein hátt, at tey nema sær serliga vitan um eitt nú búskap, løgfrøði, fiskivinnu, mál og mentan, ið kann leggjast aftrat útbúgvingini í miðlafrøði, vísti arbeiðsbólkurin á.

Longu í 2001 hevði Fróðskaparsetrið ætlanir um at bjóða út útbúgving í miðlafrøði. Síðan tá hevur eisini verið viðgjørt, um vit heldur eiga at hava eina útbúgving í journalistikki. Vit skriva skjótt 2020, og framvegis er eingin fjølmiðlaútbúgving, hvørki miðlafrøði ella journalistikkur, sett á stovn í Føroyum.

Undanfarni landsstýrismaður, Rigmor Dam, heitti í 2018 á umsitingina í Mentamálaráðnum um at umrøða møguleikan at seta á stovn journalistútbúgving í Føroyum. Peningur varð játtaður til endamálið, men komið varð tíverri ikki á mál við tí grundgeving, at avvarðandi stovnar ikki vóru klárir at seta útbúgvingina á stovn.

Eg fari tí at heita á landsstýrismannin í mentamálum um at greiða frá, um hann hevur ætlanir um at seta á stovn eina útbúgving í journalitikki í Føroyum og um so er, nær og hvussu hann heldur, at hetta eigur at verða skipað.

Á Løgtingi 28. november 2019

Djóni Nolsøe Joensen